## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Fleyr til gul av landsynningi og eystri og sirm ella mjørki av og á. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, um kvøldið lot av ymsum ættum. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinapartin regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av eystri og ælingur, týsdagin minni vindur av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.



*Crystal Symphony er eitt luksusskip av eini aðrari verð. Umborð er casino, eksklusivur køkur, gosbað og alt tað, sum tey ríku hava brúk fyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Luksus á havnarlagnum

**Fyrr í hesi vikuni hevur CRYSTAL SYMPHONY ligið við kaj í Tórshavn**

TAÐ LÆTTA LÍVIÐ
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Talan er um størsta ferðamannaskipið, sum kemur á Havnina í ár. Hetta er eitt luksusskip av eini aðrari verð. Umborð er casino, eksklusivur køkur, gosbað og alt tað, sum tey ríku hava brúk fyri.

Crystal Symphony telir sjey hundrað ferðafólk. Starvsfólkini eru færri í tali, bert seks hundrað starvsfólk. Tað vil siga, at tað er næstan eitt starvsfólk um eitt ferðafólk.

Crystal Symphony er slakar tvey hundrað og fimm og tjúgu metrar til longdar og fjúrtan túsund tons størri enn føroyski stoltleikin Norrøna.

Skipið siglir kring allan heimin. Í Føroyum er reiðaríið hjá Crystal Symphony umboðað av smápartafelagnum Baldur við Johan Mortensen

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 14 |
| Tórshavn | 15 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 22 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 26 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 22 |
| New York | 23 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 27 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1002 hPa. norðan fyri Ísland fer í landnyrðing og dýpist. Kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




Lágtrýstið við Írland fer norðureftir og hitabrúgvin haðani fer um Føroyar norðureftir leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/09 kl. 06[00]–09/09. 06[00]. Hitin í gjár: 13,5°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 08/09 kl. 06[00]–09/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 23,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

6. sept.: Seinna kvarter
8. sept.: Mánin longst frá jørðini
14. sept.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 10. sep | 04.33 | 16.56 | 03.33 | 15.56 | 03.48 | 16.11 | 06.33 | 18.56 | 07.33 | 19.56 | 02.48 | 15.11 | 01.48 | 14.11 | 04.48 | 17.11 | 05.48 | 18.11 | 04.18 | 16.41 | 05.33 | 17.56 |
| 11. sep | 05.18 | 17.40 | 04.18 | 16.40 | 04.33 | 16.55 | 07.18 | 19.40 | 08.18 | 20.40 | 03.33 | 15.55 | 02.33 | 14.55 | 05.33 | 17.55 | 06.33 | 18.55 | 05.03 | 17.25 | 06.18 | 18.40 |
| 12. sep | 06.01 | 18.22 | 05.01 | 17.22 | 05.16 | 17.37 | 08.01 | 20.22 | 09.01 | 21.22 | 04.16 | 16.37 | 03.16 | 15.37 | 06.16 | 18.37 | 07.16 | 19.37 | 05.46 | 18.07 | 07.01 | 19.22 |
| 13. sep | 06.42 | 19.02 | 05.42 | 18.02 | 05.57 | 18.17 | 08.42 | 21.02 | 09.42 | 22.02 | 04.57 | 17.17 | 03.57 | 16.17 | 06.57 | 19.17 | 07.57 | 20.17 | 06.27 | 18.47 | 07.42 | 20.02 |

ÚF
**Morgunlestrar**
**13.–18. september**

***Borgny Brünings-Hansen, prestur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 13. septemb.:**
nr. 241 Kom tú, Guðs heilagi, skapandi andi
1. Kor. 12,12 & 13
nr. 249 Guðs kirkjugrund aleina

**Týsdagin 14. september:**
nr. 255 Vár Guð er føst og haldgóð borg
Áps. 2,44

**Mikudagin 15. september:**
nr. 278 Tú, eina tú, o, Harra Krist
Luk. 7,48

**Hósdagin 16. september:**
nr. 198 Sum ígjøgnum sortar skýggjar
1. Pæt. 1,3–5

**Fríggjadagin 17. septemb.:**
nr. 323 O, kristni tú alt
Jóh. 17,3

**Leygardagin 18. septemb.:**
nr. 327 Hin signaða dag vit síggja fró
Róm. 8,21




**Vika 37 – 8. septemb.**
Vinnaratøl: 06 - 16 - 33 - 34 - 35 - 38
Eykatøl: 11 - 27
Supertal hesa vikuna: 43

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | 2.883.107,- kr. |
| 5 vinnarat.+ eykatal | 156.114,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 3.973,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 116,- kr. |
| 3 vinnaratøl: | 37,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

fk

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

5 707265 100050 >